Sosialurin

Nr. 159 - 20. august 2007

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tey tosa bara um mín aldur og mínar royndir, men hví tosa tey ikki um politikkin hjá mær*

*(Barrack Obama)*

# Flogfar kolaðist upp

**Taiwanska Boeing-flogfarið hevði júst sett seg, tá eldur kom í ein av motorunum**

157 ferðafólk vóru í Boeing-737 flogfarinum, sum fleyg millum taiwanska høvuðsstaðin Taipei og japonsku pynna Okinawa. Manningin taldi fýra.

Ferðin gekk væl, men beint eftir at flogfarið hevði sett seg á Naha-flogvøllin á Okinawa, kom eldur í ein av motorunum. Eldurin breiddi seg skjótt, men kortini eydnaðist tað øllum ferðafólkunum og manningini at sleppa út í øllum góðum.

-Vit hava júst fingið váttað, at øll eru sloppin úr flogfarinum, segði ein talsmaður hjá flogvallarmyndugleikunum.

Sjónvarpsmyndir vístu, at flogfarið var fullkomiliga uppkolað.



*Felagið Taiwan China Airlines átti flogfarið*

# Dean rekur 80.000 ferðafólk til hús

**Tropiska ódnin Dean hevur fingið myndugleikarnar í fleiri londum at senda út ávaringar**

Í Jamaica hevur stjórnin stutt og greitt gjørt av at banna fólki at fara út fyri dyr, so leingi Dean herjar landið. Sjálvt eygað í ódnini fer beint suður um Jamaica, men fram við strondini hava veðurstøðirnar mált vindferð upp í 230 kilometrar um tíman. Harafturat hevur tað regnað av grimd, og nógvastaðni verður sagt frá skriðulopum í fjallalendinum, skrivar AP.

USA sleppur eftir øllum at døma væl hesaferð. Higartil hevur Dean herjað Jamaica, Dominikanska Lýðveldið, Haiti og Martinique, og seks fólk hava latið lív. Í Kuba, Belize og Meksiko hava myndugleikarnir ávarað fólk um, at Dean er á veg. Amerikanski veðurstovnurin sigur, at Dean fer beint ímóti Yucatán-nesinum í Meksiko. Har eru fleiri sera væl umtókt frítíðarpláss, og guvernørurin í Yucatán hevur givið boð um, at 80.000 ferðafólk skulu flytast burtur haðani, áðrenn Dean kemur í land.

Í 2005 rakti ódnin Wilma sama økið og gjørdi stóran



*Higartil hevur Dean kravt minst seks mannalív*

# Natascha keypir húsini sum hon sat fangi í

**Natascha Kampusch ætlar sær tú at keypa húsini hjá sínum egna burturflytara**

- Hon ætlar sær ikki at búgva har, men hon vil ikki, at húsini í Strasshofer Heinestrasse 60 skulu byggjast um til eitt savn, soleiðis sum onkur ætlar. Tað sigur sakførarin hjá Nataschu Kampusch við týska blaðið Bild.

Wolfgang Priklopil átti húsini í Strasshofer Heinestrasse 60. Hann burturflutti Nataschu Kampusch, og í meiri enn átta ár fjaldi hann hana í einum rúmi í húsunum. Hósdagin er eitt ár, síðani hon slapp til rýmingar.

- Eg eri ikki eitt offur, sjálvt um onnur royna at gera meg til eitt tað, sigur Natascha Kampusch við eysturríkska sjónvarpið. Teir seinastu mánaðarnar hevur einki verið at hoyra frá henni, men í kvøld sendir eysturríkska sjónvarpið eina samrøðu við hana.

*Natascha Kampusch: - Eg eri ikki eitt offur*



## STUTT SAGT

### Grimdarregn í USA

Tað regnaði óvanliga illa í amerikonsku statunum Minnesota, Oklahoma og Wisconsin í gjár, og minst fýra fólk doyðu. Nærhendis býnum Witoka skolaði ein partur av vegnum burtur við tí úrsliti, at fleiri bilar fóru útav. Aðrastaðni oyðilegði regnið bæði hús og jarnbreytir, og í Minnesota gjørdu myndugleikarnir av at flyta fólk úr fleiri bygdum fram við ánni Whitewater, tí áin floymdi upp um áarbakkarnar.

### Lupu á løgreglustøð

Fyrrakvøldið lupu umleið hundrað ungfólk á eina løgreglustøð í enska býnum Great Yarmouth. Tey ungu tveittu øl- og vínfløskur eftir løgreglustøðini, og løgreglan noyddist at biðja um hjálp úr grannabýunum. Álopið endaði við, at løgreglan gjørdi mótálop, og 15 ungfólk vórðu tikin. Eingin løgreglumaður fekk skaða, men tveir bilar hjá løgregluni vórðu oyðilagdir. Hildið verður, at tey ungu vóru í øðini, tí løgreglan hevði tikið trý onnur ungfólk nakað frammanundan.

### Ikki fleiri dystir

Barrack Obama, sum roynir at gerast forsetavalevni hjá demokratunum í USA, hevur ongan hug at taka lut í valdystum við sínar floksfelagar longur. Í seinastuni hava valevnini hjá demokratunum dystast fleiri ferðir, men Obama er vorðin troyttur av, at hini valevnini alla tíðina siga hann hava ov lítlar royndir til forsetaembætið. Tí sýtir hann nú fyri at taka lut í fleiri valdystum.